

16 Sosialurin Nr. 192 - 7. oktober 2008

# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Neyðugt við gransking og kanningum

Í gjár høvdu vit eina søgu um sjúkuna CTD, ið er vanligari í Føroyum enn í øðrum londum. Víst varð á, at vísindaligar kanningar av CTD í Føroyum vísa, at ein av hvørjum 18 føroyingum, ella 5,5 prosent, eru berarar av sjúkuni, meðan ein av hvørjum 1.300 longu hava sjúkuna. Um teir kendu tilburðirnir verða drignir frá, merkir tað, at einir 30-40 føroyingar hava sjúkuna. Danskur professari og ílegugranskari á Ríkissjúkrahúsinum sigur, at við einum títtleika í Føroyum uppá ein av hvørjum 1.300, so verður eitt barn við CTD føtt hvørt ár – ella í minsta lagi annaðhvørt ár. Sjúkueyðkennini vísa seg á tvinnanda hátt: Hjá pinkubørnum við at kroppurin orkar ikki at standa ímóti infektiónum.Hjá vaksnum vísir sjúkan seg eisini við manglandi orku, sum ger, at hjartað veksur og verður ovbyrjað, so tey í veruleikanum eru hjarta-sjúklingar. Í báðum førum kunnu sjúklingarnir doyggja, um teir skulu brúka eyka orku, til dømis í sambandi við smittu ella aðra strongd. Verða tey sjúku ikki funnin og viðgjørd, so doyggja tey helst av sjúkuni longu sum smábørn, ella knappliga av hjartaslagi, tá tey eru vaksin. Hinvegin er sjúkan einføld at viðgera, so her er talan um mál, ið má verða tikið upp í heilsupolitiskum høpi.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, sigur við blaðið, at hann er illa við av, at so nógvir føroyingar eftir øllum at døma ganga runt við einari so vandamiklari sjúku, uttan at vita av tí, og hann tekur málið í størsta álvara. Landsstýrismaðurin ætlar sær alt fyri eitt at taka stig til at lýsa málið nærri, og hann fer tí at venda sær til Landslæknan og biðja hann gera eina heilsufakliga lýsing og tilráðing av málinum. Landsstýrismaðuirn fer so við støði í tilráðing landslæknans at taka eina politiska avgerð, um, hvat ið víðari skal henda.

Tað er sjálvsagt at fegnast um, at heilsumálaráðharrin tekur hetta mál upp alt fyri eitt, tí hetta er eitt mál, ið nemur við fólkaheilsuna. Málið er hartil sera áhugavert, tí tað er eitt dømi um, hvussu stóran týdning ein ábyrgdarfull og miðvís ílegugransking kann vera til alment gagn. Sum kunnugt hava vit fingið lóggávu um ílegugransking, ið heimiðlar stovnseting av føroyskum ílegubanka, hvørs upplýsingar kunnu gagna í slíkum málum sum hesum um sjúkuna CTD. Hinvegin veit almenningurin lítið og einki um støðuna sum heild innan gransking í føroyskum ílegum. Hvør granskar hvat? Hvør fíggjar granskingina? Hvørji eru úrslitini higartil og hvørji úrslit kunnu vit vænta okkum í framtíðini. Landsstýrsifólkini við gransking og heilsu áttu at kunnað almenningin um støðuna og um tær ætlanir, ið eru fyri framman.

**Sosialurin**

## Seturssemja – ynski um eina tvørpolitiska semju um ein føroyskan universitetspolitikk

**JÓAN PAULI JOENSEN**
Professari, dr.phil. & fil. dr. Rektari á Fróðskaparsetri Føroya

Í londunum rundan um okkum er tað sera vanligt at gera tvørpolitiskar semjur um ávís viðurskifti í samfelagnum. Hetta átti eisini at borið til í Føroyum. Tað er einki yvir at dylja, at føroyskir politikarar, uttan mun til flokk, í 2008 hava sýnt sera stóran áhuga fyri at seta út í kortið av nýggjum, tá tað um hægri undirvísing og gransking ræður. Vit, sum arbeiða á Fróðskaparsetrinum nýggja, hava fingið eina kenslu av, at politikararnir viðganga, at teir eiga hetta barn, tí 30. mai 2008 samtyktu allir 33 løgtingslimirnir eina nýggja lóg um Fróðskaparsetur Føroya. Eitt setur sum fevnir um Læraraskúlan, Sjúkraróktarfrøðiskúlan og tað, sum higartil hevur verið nevnt Fróðskaparsetrið.

Í politisku umrøðuni var eitt fløvandi orðaskifti, har eisini orð sum altjóða universitet gjørdist partur av retorikkinum. Tosað varð um menning av hægru útbúgvingini, um at skapa møguleikar fyri teimum, sum høvdu fingið sær hægri útbúgving, at venda heim aftur. Eisini hevur verið talað um, at ein so stórur partur av ungdóminum skal byrja sína útbúgving í Føroyum, fara út í onnur lond, koma aftur og skapa eitt livandi umhvørvi her. Eisini hevur verið tosað um at fáa fremmandar studentar til Føroya. Hatta er einki nýtt. Tað eru júst somu tankar um globalisering, sum politikararnir í øðrum londum eisini røða um.

Tað positiva í nýggju lógini er, at nú renna lærara-útbúgvingin, ein tann elsta útbúgvingin, og skjótt eisini skiparaútbúgvingin, sum eisini er gomul, saman í eina heild við klassiskum universitetsútbúgvingum og útbúgvingum í sjúkrarøktarfrøði og námsfrøði, í samsvari við ta evropeisku Bolognasamtyktina.

Lærarautbúgvingin, pedagogútbúgvingin og sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingin eru vorðnar akademiseraðar. Skjótt koma skipsførara- og maskinmeistaraútbúgvingarnar teimum á baki. Tá tað snýr seg um hægri undirvísing og gransking eru viðurskiftini vorðin alt meira kompliserað og krevjandi. Eisini eru tað eygu, sum duga at síggja, at gransking ikki longur bert hoyrir til tær klassisku universitetslærugreinirnar, men at markini eiga at verða flutt munandi.

Alt verður hinvegin ikki gjørt eftir einari nátt, men kósin, hon má setast út í kortið. Hon kann ikki vera "í vildensky", sum ein sluppskipari einaferð ironiskt segði. Tað er neyðugt, at vit seta okkum eitt mál, og at vit leggja eina ætlan fyri, hvussu vit skulu koma á mál. Fyrsta stigið móti hesum máli hava vit longu tikið. Lærararnir á sjúkrarøktarfrøðiútbúgvingini hava tikið eitt stórt tak við at uppstiga sín lærdóm til masterstøði. Hetta var minsta kravið fyri at kunna fara undir eina bachelorútbúgving í sjúkrarøktarfrøði. Somu krøv eru eisini galdandi á Læraraskúlanum, og Vinnuháskúlin berjist í løtuni fyri tí sama. Men hetta er bert byrjanin, tað næsta er at uppstiga lærarar á øllum setrinum til eisini at kunna verða granskarar, og her er ein Ph.D.-útbúgving kravið í øllum londunum rundan um okkum. Hetta letur seg alt gera innan fyri eitt áramál, lat okkum siga 10 ár, men á fleiri økjum kann tað gerast fyrr.

Tað, sum fyrst ræður um hjá okkum her á landi, er at fáa undirvísingina upp á eitt altjóða universitetsstig, men undirvísingin er bert ein táttur av hesum – at leggja vitan niður í studentarnar. Hin parturin er, at við á universiteti okkara eisini sjálv skulu framleiða vitan við at granska, og vísindastarvsfólkini mugu fáa stundir til tess.

Tað skerst ikki burtur, at tá tað kemur til hægri undirvísing og gransking, so eru Føroyamálsdeildin, Náttúruvísindadeildin og Søgu- og samfelagsdeildin á Fróðskaparsetrinum komin longst, men sjálvt her skal nógv til, áðrenn vit eru komin upp á eitt nivo, sum er nóg gott. Tí umframt at granska, skal eisini bera til at geva studentum møguleika at byrja á hvørjum ári.

Í 2008 varð játtanin til setrið gamla hækkað so mikið, at tað hevur borið til at seta fleiri nýggj størv, men tað tekur tíð at seta akademisk størv. Summi fólk koma so seint í starv í 2008, at tey merkjast ikki rættiliga fyrr enn í 2009. Tí er neyðugt at taka uppskot setursins í álvara og at hækka játtanina munandi í 2009. Ein tummilfingraregla sigur, at tað krevjast góð 20% av lønarútreiðslunum til rakstur bert fyri at halda virkseminum gangandi. Hetta vita øll í umsitingini, og verður roknað við veruligari nýskapan, eigur hesin parturin at verða størri.

Fróðskaparsetrið hevur sent Mentamálaráðnum eina nágreiniliga framtíðarætlan við tølum á. Skal nakað skil vera í, og skal tað bera til at leggja ætlanir um undirvísing, at gera samstarvsavtalur við onnur universitet og fyri bert at fáa ein pinkulítlan leiklut á altjóða undirvísingar- og granskingarpallinum, er tað avgerandi neyðugt, at føroyskir politikarar semjast um játtanina til Fróðskaparsetrið ikki bert í 2008, men eini 5 ár fram. Tástani kunnu studentarnir fáa álit á setrinum, tástani fara lærarar í lívfrøði, evnafrøði og øðrum starvsstovukrevjandi fakum at kenna, at teir kunna skapa samfelagsvirði. Tað er fyrst og fremst ein politiskur spurningur, um vit vilja hava eitt universitet í Føroyum ella ikki. Í 2008 er byrjaður ein góður gerningur, og eg fari tí at heita á politikarar okkara um at fullføra hann.

Herfyri spurdi ein av mínum kenningum meg, hví vit á Fróðskaparsetrinum ikki spurdu okkum fyri hjá onkrum stórum donskum universiteti, um tað ikki bar til at leggja saman við teimum, men við einum altjóða kampusi í Føroyum. Svar mítt var, at eg helt ikki, at tað riggaði til føroyskan politikk, men eitt veit eg – tá høvdu vit fingið eina ætlan fyri framtíðina.

**Gjald fyri valgreinar**

Fram til kommunuvalið 11. november fer Sosialurin at taka gjald fyri valgreinar. Gjaldið er hálvur lýsingarprísur fyri t. e. 95 oyru + MVG fyri millimeturin. At rokna sum valgreinar eru allar greinar, sum valevni skriva - og geinar frá øðrum, sum blaðstjórnin metir sum valtilfar. Skipanin verður í gildi fram til kommunuvalið. Valgreinar skulu sendast við telduposti til post@sosialurin.fo - og tær skulu vera rættlisnar og harvið púra klárar at prenta.

**Blaðstjórin**

Sosialurin
Blaðfólk: Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Kykmyndir: Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo
Uppseting/prent: Uppseting: Sosialurin Prent: Prentmiðstøðin
Lýsingar Freistir: Tekstlýsingar Størri lýsingar Lýsingartorgið Heilsanir

# NA LÍNU

# roysk a tovu



Ulrike Steuerwald, barnalækni

av carnitin í turrblóði á Ríkissjúkrahúsinum, meðan somu royndir kunnu gerast í Týsklandi fyri 100 Kr. Og genkanningar, sum Ríksisjúkrahúsið tekur 3.500 kr. fyri, verða gjørdar á privatari kanningarstovu í Odense fyri bert 500 kr.

Men serliga fílist Ulrike Steuerwald á, at kanningar av PKU-kortum umfata ikki føroyingar, sum eru føddir uttan fyri Føroyum, tí her er talan um rættiliga nógv ung fólk í besta aldri. Eisini vísir hon á, at kanningar av PKU-kortum eru bert 85 prosent álítandi, og tí eigir ein tilbúgving at verða sett í verk, har allir føroyingar fáa í boði at kanna innihaldið av carnitine í blóðinum. Í teimum førum, har innihaldið er lágt, verður tilboð um genkanning givið.

Men, hóast umfatandi fundarvirksemi og brævasamskifti millum allar partÂ±arnar, er ilt at fáa eyga á nakra loysn.



# CTD fyrilestur í Miðlahúsinum

**Hin 14. august hevur týski barnalæknin, Ulrike Steuerwald, fyrilestur um sjúkuna CTD í Miðlahúsinum**

HEILSA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Fríggjakvøldið 14. August hevur Ulrike Steuerwald, barnalækni, fyrilestur um sjúkuna CTD í Miðlahúsinum.

Hon var fyrsti læknin í Føroyum, sum fann eitt samband millum brádligan deyða hjá børnum og ungum í Føroyum og sjúkuna CTD. Ulrike Steuerwald sigur við Sosialin, at fyrilesturin í stóran mun er ætlaður teimum, sum onkusvegna eru rakt av sjúkuni.

Hon fer at greiða frá um carnitine, carnetine transporter og um carnetine transporter defekt (CTD). Eisini verður tosað um serstøðuna í Føroyum, og hvørjir kanningar- og viðgerðarhættir eru tøkir.

Eisini er ætlanin at seta á stovn eitt sjúklingafelag fyri sjúk og avvarandi hetta kvøldið í Miðlahúsinum.

Tiltakið við Ulrike Steuerwald hevur verið fyrireikað síðan juni mánað, og hevur onki við aktuella málið at gera.

Fyrilesturin í Miðlahúsinum verður kl. 19.00 og øll eru vælkomin – bæði vanligir borgarar og starvsfólk innan heilsuverkið.